*Til Fjølmiðlanevndina*

*Føroya Kærustovnur*
*Undir Hornabakka Postboks 45*
*Fo-110 Tórshavn*

Triðja svarskriv til hoyringsskriv úr Fiskimálaráðnum

Enn einaferð skullu vit leggja rygg til skuldsetingar úr Fiskimálaráðnum, sum roynir at snara væl dokumenteraðu viðgerðina av menningarkvotunum í greinarøð í Norðlýsinum.

Harafturat illskast Fiskimálaráðið inná at Norðlýsið hevur valt at leggja, kæru-, svar- og hoyringsskriv alment út, so almenningurin hevur møguleika at seta seg inn í málið. At Fiskimálaráði í hesum sambandi vísir til at landsstýrismaðurin ikki fær vart seg, er sera trupult at skilja. Skal landsstýrismaðurin nú eisini spyrjast áðrenn Norðlýsið sendir fjølmiðlanevndini og almenninginum svarskriv okkara uppá niðrandi og ógrundaðu ákærurnar úr Fiskimálaráðnum?

Undirritaði hevur roynt at hildið seg burtur frá at fara inn á løgfrøði, hóast landsstýrismaðurin, umvegis Fiskimálaráði, hevur hótt við møguliga ikki at virða niðurstøðuna hjá Fjølmiðlakærunevndini. Hann hevur gjørt greitt at landsstýrismaðurin og ráðið umhugsað, at leggja málið fyri dómstólarnar, tí Fiskimálaráðið metir at Norðlýsið hevur brotið lógarreglu, sum kann geva fongsulsrevsing til undirritaða og blaðstóra upp til tvey ár.

## Eru eingi mørk fyri hvat ein landsstýrismaður kann loyva sær?

Sakin er tann at Norðlýsið í greinarøð hevur víst á, at í samband við, menningarkvoturnar og fyrisitingina hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum av lóg um fyrisiting av sjófeingi, er heimildargrundarlagið hjá landstýrismanninum og fiskimálaráðnum sera ivasamt, tá tað kemur til menningarkvoturnar.

### Lóg um fyrisiting av sjóvfeingi

***Kapittul 11***

***Menningarkvotur***

***§ 60.*** *Ein partur av tøkari føroyskari kvotu kann verða settur av til at brúka sum liður í vinnuligum menningarætlanum kring landið. Latast kunnu í mesta lagi 8,5% av samlaðu føroysku kvotuni av ávísa fiskaslagnum.*

*Stk. 2. Kvota, sambært stk. 1, kann latast til menningarætlanir, sum kunnu stuðla undir virðisøking av sjófeingi í ávísum øki í landinum, har atgongd til sjófeingi er avmarkað, ella arbeiðsloysið er stórt, samanborið við onnur øki í landinum, ella øki við støðugt minkandi fólkatali.*

*Stk. 3. Kvota verður veitt eftir, at alment er lýst eftir umsóknum. Tá lýst verður eftir umsóknum, skal neyvt ásetast, hvørjar treytir eru fyri at fáa lut í kvotuni. Í treytunum skal dentur leggjast á, at kvota verður latin til virksemi og verkætlanir, ið stuðla undir menning, virðisøking, arbeiðsmøguleikar og inntøkumøguleikar í ávísa økinum, sambært stk. 2.*

*Stk. 4. Landsstýrismaðurin setir nærri reglur um mannagongdir og treytir sambært ásetingunum í stk. 1-3.*

Í upprunaligu tilsóknunum til tey sum fingu menningarkvotur, standa m.a, hesar treytir:

*… skal Fiskimálaráðið boða frá, at verkætlan tykkara fær tillutað niðanfyristandandi kvotur treytað av, at:*

- *Skjalprógv uim egninpening og skipakeyp fyriliggur*
- *Ein íløgu-, fíggjarætlan eigur at fyriliggja…..*

*… - at felagið sendir útgreinaða tíðarætlan fyri nær íløgurnar á virkjunum væntast at verða liðugt gjørdar og klárt verður at taka móti fiskinum á virkinum.*

Tillutað varð í einum føri fyrst 10.400 tons av svartkjafti, til ein ávísan aktør, sum skuldi fiska og virka svartkjaftin eftir góðkendari verkætlan í 2018 og harafturat skuldu hann eisini fiska og virka 2.002 tons av makreli og 1.593 tons av sild, stendur at lesa í upprunaligu tilsóknini. Endaliga tonsatali av uppisjóvartilfeingið, sum hetta dømi (P/F Kinfelli) fekk varð eitt sindur hægri tá avtornaði, tí fiskimálaráðið afturhelt ein part av kvotuni til allar umsóknirnar vóru ligðugt viðgjørdar.

Í upprunaligu tilsókníni (Sí PDF HER: https://nordlysid.fo/upload/tinymce/c79452914e66140e5ac98a98a42491cc924d0f9c.pdf ) stendur eisini púra greitt:

*"TANN TILLUTAÐA KVOTAN **SKAL GAGNÝTAST** INNAN FYRI VERKÆTLANINA"*

Harafturat stendur púra greitt:

*"Í tann mun kvotan ikki kann gagnnýtast innanfyri verkætlanina, **SKULU** tit boðad Fiskimálaráðnum frá **hesum innan 3. September 2018.**"*

Út frá teimum skjølum, sum vit hava fingið innlit í er sera trupult at síggja hvussu Fiskimálaráði kann koma til tað niðurstøðu at nevndi aktørur líkur treytirnar í tilsókníni, kunngerðini ella lógini um menningarkvotu.

Í upprunaliga tilsóknarblaðnum tilskilar fiskimálarráði at tað hevur rætt til at taka tann partin av kvotuni aftur *"sum ikki kann gagnýtast innan verkætlanina."*

Endin var at P/F Kinfelli, sum vit her hava brúkt sum dømi, fekk 13.000 tons av svartkjafti í 2018 júst sum metingarnevndin segði í tilmæli sínum og ein lítil sera avmarkaður partur bleiv fiskaður og brúktur innan góðkendu verkætlanina. Restin umleið 90% varð selt uttanfyri verkætlanina til alifóður.

Hvat síðani hendi, er væl lýst í greinarøð í Norðlýsinum og í undanfarnum svarskrivum til fjølmiðlakærunevndina, so tað lata vit liggja.

Men tá komið var út í november var púra greitt, at tað sum øll vistu frammanundan, eisini Fiskimálaráðið, varð vorið veruleiki: Omanfyri 90% av útlutaða uppisjóvartilfeinginum varð ongantí fiskað.

Og tað er eisini staðfest at aktørarnir, fingu eina sera ivasama viðger í Fiskimálaráðnum, har summir vóru frátiknir uppisjóvartilfeingið, meðan aðrir varðveittu sítt tilfeingið, hóast teir í samskiftið við Fiskimálaráði hava boða frá at teir ikki kunnu gagnnýta meira enn 10% av svartkjafta tilfeingininum innanfyri verkætlanina.

Alt hetta hava vit lýst baði í Norðlýsinum og í samskifti við fjølmiðlakærunevndina.

Vit hava enntá ávíst skjalprógv fyri at Fiskimálaráðið er fari at fíggja raksturin hjá aktøri so vinnurekandi partafelagið kundi yvirlivað. Tað stendur beinleiðis í avgerð hjá ovastu leiðsluni í Fiskimálaráðnum, at hóast nevnda dømi (P/F Kinfelli) ikki var/er førur fyri at liva upp til grundleggjandi treytirnar í upprunaligu tilsóknini, sum var at tilfeingi **SKULDI** gagnnýtast innanfyri verkætlanina, so verða lovi givin til at selja menningartilfeingið uttanfyri menningarverkætlanina fyri *"AT TRYGGJA FÍGGJARLIGA RAKSTURIN"* sum Fiskimálaráði skrivar í undantaksloyvinum.

Hetta hendi samstundis sum aðrir aktørar mistu sínar menningarkvotur.

Fyri kortum fekk P/f Kinfelli loyvi fram til 31. Desember 2019 at fiska svartkjaft og selja uttanfyri verkætlanina og uttanfyri menningarøkið hóast leiðslan í felagnum hevur fráboða leiðsluni í Fiskinmálaráðnum at tað ikki fer at verða gjørligt at framleiða umleið 90% av svartkjaftakvotuni, sum felagið hevur fingið tillutað eftir lógarparagraffunum um menningarkvotu (sí lóg omanfyri).

At Fiskimálaráðið í sínum tulkingum av ÓSKIVAÐUM REGLUM (neyðrættarreglum) er komið fram til, at tað hevur fullan rætt til at brúka ”fólksins ogn” sum fíggjarligan stuðul til einstøk vinnurekandi partafeløg, sigur ikki so lítið um ráðandi huglagi í Fiskimálaráðnum.

Um vit skullu taka samanum fatanina sum Fiskimálaráðnum hevur av nýggju fiskivinnulóggávuni ”Umsiting av Sjóvfeingi” út frá drúgvu løgfrøðiligum svarskrivini frá Fiskimálaráðnum til fjølmiðlakærunevndina, so kann hon lýsast við fimm orðum:

”Landsstýrismaðurin ger sum hann vil!”

Hetta er væl eisini í fínasta lagið um hetta er tað sum løgtingið vildi við nýggju fiskivinnulóggávuni, men tað stendur so ikki í lógini.

Uppgávan hjá okkum miðlum er at konfrontera polittikkara við tað tey siga og halda tað upp ímóti tí tey fremja í verki.

Var tað ætlanin tá løgtingið samtykti nýggju fiskivinnulóggávuna, at tilfeingið, sum eftir drúgvar politiskar samráðingar og politiskar rossahandlar var avsett til menningarkvotur, ístaðin skuldi avreiðast til Havsbrún í Fuglafirði til framleiðslu av alifóður, bert fyri at eitt partafelag í Miðvági, skuldi fáa endarnar at røkka saman?

Var tað soleiðis  løgtingið ætlaði at ”Ogn Føroya Fólks” at landsstýri skuldi fyrisita lóg um sjóvfeingi?

Hetta er tó ikki fyrstu ferð at landsstýrismaðurin í Fiskivinnumálum hevur ”forera” fiskatilfeingið til vinnurekandi at selja víðari.

Landsstýrismaðurin avgjørdi í 2015 at útluta svartkjaft, sum felagskvota, og í hesum sambandi varð eitt upprit skrivað av fulltrúðunum í Fiskimálaráðnum, Jens Helga Toftum og Janet Nørregaard tann 22. oktober 2015.

Uppritið er skrivað beint eftir at Høgni Hoydal tók við, sum landsstýrismaður og í uppritinum verður ávarað ímóti ætlanunum hjá landsstýrismanninum at loyva so mongum skipum, sum gjørligt, harímillum línuskipum, at fiskað svartkjaft.

Undir avhoyringini av landsstýrismanninum í samband við eftirfylgjandi kanningarstjóramálið, varð í rættarsalinum lisið upp úr skjalinum og har kom fram at fulltrúarnir í Fiskivinnuráðnum ávaraðu um fylgirnar og at hetta kundi føra til óhepnar støður fyri umsitingina, tí at hetta gekk ímóti niðurstøðuni hjá Løgtingsins Umboðsmanni.

Í kunngerðini fyri svartkjaftabýti í 2015, sum Høgni Hoydal lýsti stendur m.a.:
*425.000 tons (Heildarkvota av svartkjafti 2015) av hesum kunnu*
*343.000 fiskast av fiskiførum undir føroysum flaggi*
*223.000 tons verða avsett til uppisjóvarskip, nóta- og ídanðarskip – eginvotur*
*120.000 tons verða avsett sum felagskvota.*

Línuskipið Helena, sum er bygd sum línuskip, hevur seinastu mongu árini ligið og rustað niðanfyri Klaksvíkshandilin úti í gomlu Klaksvíkini.

Høgni Hoydal foreraði gylt uppisjóvartilfeingið til hetta skipsvrakið, sum á ongan hátt var ført fyri at fiska. Eigararnir av skipinum fingu eina gávu frá landstýrismanninum og Fiskimálaráðnum, sum baði landsstýrismaðurin og Fiskimálaráði vistu ikki kundi fiskast, men bleiv kapitalisera av øðrum.

Tann 11. desember 2014 hevði Løgtingsins umboðsmaður annars gjørt eina lemjandi niðurstøðu í samband við makrelbýti í 2012:

*…. Av tí at línuskipini ikki høvdu tann neyðuga reiðskapin til at fiska makrel, havi eg torført við at síggja, at tað var sakligt í makrelkunngerðini at tillutað línuskipum eina makrelkvotu, sum tey ikki kundu gagnnýta…..*

Hóast stýrisskipanin í ár er 25 ára gomul og hon sera greitt útgreinar ábyrgdarøkini í skipanini er eingin enn verið hildin til ábyrgd av løgtinginum, hóast málini hava verið sera mong. Onkur landsstýrismaðurin er tó rokin tá larmurin frá miðlum og almenninginum er vorðin ov nógvur.

Í brævi til undirritaða frá aðalstjóranum í Fiskimálaráðnum tann 1. Apríl 2019, verður roynt at undirspæla lógarteksin í nýggju fiskivinnulóggávuni.

Aðalstjórin sigur at tað er ikki rætt at kalla tey frávik, sum Fiskimálaráði hevur loyvt ávísum aktørum at gera frá góðkendu verkætlanunum, fyri undantaksloyvi.

*….. í tilsagnum hevur Fiskimálaráðið brúkt orðingar so sum, at tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan verkætlanina og at boðast skal frá broytingum í viðurskiftunum viðvíkjandi verkætlanini……*

*… Um hugsað verður um, hvussu tey einstøku feløgini hava skipað sína rávørutilgongd og móttøku ta fyrstu tíðina, kann Fiskimálaráðið kunna um, at eitt sindur av samskifti hevur verið um, hvussu tey vinnurekandi kunnu – ella noyðast – at skipað rávørumóttøkuna í smálutum í byrjanini…..*

Um tað at so at siga allur tann tillutaði svartkjafturin verður seldur uttanfyri verkætlanina, skrivar Fiskimálaráðið soleiðis:

*…. Í síni heildarmeting hevur Fiskimálaráðið staðfest, at **smávegis tillagingar** eru gjørdar í rávørutilgongdini ta fyrstu tíðina fyri nakrar umsøkjarar…….*

Altso – tað at P/F Kinfelli selur so nógv tann størsta partin av tillutaða menningartilfeinginum uttanum góðkendu verkætlanina, sum øll tilsøknin um menningarkvotu byggir á, kallar Fiskimálaráði ”smávegis tillagingar”????

**Landsstýrismaðurin verjuleysur?**

Tað er ikki rætt tá Fiskimálaráðið kærir seg um at landsstýrismaðurin ikki er sloppin at verja seg. Men vit mugu ásanna at tað er sera trupult at samskifta við ein landsstýrismann, sum ikki svarar telefon ella teldupostum tá Norðlýsið ringir ella skrivar. Harafturat hevur landsstýrismaðurin hollar royndir sum

fjølmiðlamaður og hevur tí allar møguleikar at svara uppá tey iva mál, sum Norðlýsið hevur avdúka, men tað hevur landsstýrismaðurin ikki valt at gera.

Tað tykist sum at landsstýrismaðurin hevur stungið høvdi niður í sandin og so vóna at málini um menningarkvoturnar fóru at hvørva úr miðlunum.

Tær viðmerkingar sum hann so hevur gjørt hava verið sera truplar at fylgja. Kendasta útsøgnin hjá landsstýrismanninum í hesum sambandi var tá hann í samrøðu við útvarpið og sjónvarpið segði í viðmerking til at umleið 90% av menningarkvotunum í 2018 ikki blivu uppfiskaðar: " ….**vísir at skipanin virkar**….".

Landsstýrismaðurin tykist als ikki at hava veruleika kenda fatan av øllum tí ruðuleika, sum hevur verið umborð á skipum, úti á fiskifeltinum og í hansara egna ráðið. Ein ruðuleiki sum er skaptur í Fiskimálaráðnum og sum hevur kosta og framvegis kostar vinnu og landi nógvar pengar.

Hetta kann samanberast við um vit hugsað okkum at løgreglan hevði tikið ein landsstýrismann fyri rúsdrekkakoyring, og einasta viðmerkingin til fjølmiðlarnar var:

"At hetta vísir bara at skipanin virkar!"

Tað er ikki lætt hjá okkum sum fjølmiðlafólk at lýsa politisk- og umsitingarlig mál fyr lesarum, tí ofta hava vit einans atgongd til at síggja "toppin av ísfjallinum".

Tað er sera týdningarmikið at vit sleppa at halda fram við at lýsa mál og royndirnar hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at tiga málið í hel og royndirnar hjá umsitingini í Fiskimálaráðnum at leggja eitt løgfrøðiligt roykslør kring umsitingina av nýggju lógina "Umsiting av sjóvfeingi" kann ikki sleppa politisku skipanini og veljarum undan tí ábyrgd, sum hvílir á okkum øllum – at geva veruleikanum ans!

Fiskimálaráðið ger eisini nógv burtur úr, at Norðlýsið hevur víst til mannarættindini, og tað talu- og skrivifrælsi sum fjølmiðlar hava sambært artikul 10 í europeiska mannarættindasáttmálanum.

Eisini her roynur landsstyrismaðurin at snara málinum á og flyta fokus. Fjølmiðlar hava loyvi til at kritisera ein landsstyrismann, og fjølmiðlarnir kunna gera hetta, uttan at skula leggja fram fullfíggja prógv fyri sínum pástandum. Longri er tann søgan ikki.

Vit hava bert skriva tað sum vit hava dokumentatión fyri út frá teimum skjølum, sum Fiskimálaráðið hevur loyvt okkum atgongd til.

Samanumtikið meta vit, at tað er sera sannlíkt at Høgni Hoydal hevur misrøkt sínar skyldur sum landsstyrismaður við at umsita menningarkvoturnar á ein tilvildarligan hátt uttan at kunna vísa til nakra løgtingslóg.

Klaksvík tann 18. Mai 2019

Vinarliga heilsan

John William Joensen
Prentari
Norðlýsið